# Man má vera alsidig



**Arthur Ellingsgaard hevur í samfull 26 ár arbeitt sum umsjónarmaður hjá Eiðis kommuna. – Hjá okkum er eingin dagur eins. Tað er altíð okkurt at gera, sigur hann**

## Fríðkan



Snorri Bend
snorri@sosialurin.fo

**Eiði:** Veðrið er til útiarbeiði her við nýggja kirkjugarðin á Eiði.

Miðskeiðis í garðinum beint niðanvert vøkru kirkjuna, stendur Arthur í hvítum búna við eini sláimaskinu í hondini.

Hann er komin nakað væl áleiðis í arbeiði sínum. Nú fer at líða móti døgurða og fyrraparturin er komin at enda.

Veðrið er av tí allarbesta. Eitt lot fer gjøgnum bygdina, men hvat sakar tað, tá sólin skínur bæði oman og niðan henda vakra seinsummardagin.

At sláa grasið er bert eitt av mongum ymiskum arbeiðum hjá Arthuri. Hansara arbeiði er so fjølbroytt, at tá hann fer frá arbeiði um kvøldið, veit hann ikki altíð hvat hann skal byrja uppá kl. 8 morgunin eftir.

- Jú, vit fáa so sanniliga dagin at ganga. Tað er einki at snakka um, sigur royndi umsjónarmaðurin.

### Umhyggin

Við hepnari og kønari hond slær Arthur vælvaksna grasið millum tær mongu gravirnar í kirkjugarðinum.

> *Ta einu løtuna kunnu teir rudda í bygdini. Eina aðra løtu kemur ein fráboðan um eina tipta rennu. Ta næstu eru teir í lítlu viðarlundini í Múlavík*

Grasið fýkur í allar ættir frá slámaskinuni, og nógv av tí kemur eisini uppá gravsteinarnar. Men her er Arthur tó rættiliga umhyggin í sínum arbeiði.

Hansara ynski er at arbeiðið skal verða so væl úr hondum greitt sum tilber. Tí er arbeiðið ikki liðugt, tá sláingin er at enda komin.

- Vit byrjaðu í fjør at spula gravsteinarnar og kantarnar aftaná, soleiðis at grasið ikki verður hangandi í teimum. Eg haldi, at fólk eru fegin um tað, sigur Arthur.

Vanliga plaga teir at sláa báðar kirkjugarðarnar tvær ferðir um árið, tó soleiðis at tann nýggi verður sligin tríggjar ferðir.

- Gróðurin hevur kortini ikki verið so góður í summar. So eg vænti ikki, at hann verður sligin aftur í ár.

- Men vit fáa at síggja, sigur hann.

### Avbrotið arbeiði

Dagin fyri, var Arthur byrjaður at sláa kirkjugarðin, og nú var hann komin rættiliga væl áleiðis.

- Tú veitst, hvussu tað er: Ein byrjar eitt arbeiði, men ein verður avbrotin alla tíðina í arbeiðinum: So skal ein brotin rútur skiftast út. Og so skal ein slá setast fyri eina hurð í EB-húsinum, soleiðis at børnini í barnagarðinum ikki sleppa út á vegin.

- Nú vænti eg at verða liðugur við hetta út á seinnapartin, um ikki okkurt annað stingur seg upp, sigur Arthur.

Hann plagar at fáa ung fólk sum hjálp til at raka tað sligna